# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Førleikamenning av fjølmiðlafólki

Spurningurin um eftirútbúgving ella førleikamenning av journalistiska starvshópinum í føroyska fjølmiðlaheiminum er vorðin sera aktuellur. Tað eru fleiri orsøkir til, at málið kemur á dagsskrá júst nú. Málið var til umrøðu á ársaðalfundi Blaðmannafelagsins seinasta vikuskifti í Hósvík. Í sambandi við fimtiára hátíðarhaldið hjá Kringvarpinum hevur verið ein breið og sera áhugaverd viðgerð av fjølmiðlastøðuni sum heild og hevur serstakliga verið fokuserað á journalistisku førleikarnar og móðurmálið í loftbornu miðlunum. Í eini av sendingunum varð frá hesum stað mælt til, at tað almenna skal stíla fyri eini skipaðari eftirútbúgving av føroyskum journalistum.

Ásannast má, at tað er í tøkum tíma, at journalistar og teirra arbeiðsgevarar taka hetta málið upp. Allir partar eru samdir um, at eitt nú føroyska málið í bløðum og loftmiðlum treingir til eina køna og bøtandi hond. Málbrúkið í fjølmiðlunum er helst tað mest eygsýna økið, har tørvur er á eftirútbúgving. Men her eru onnur øki við. Journalistikkur snýr seg um annað enn at duga gott føroyskt mál. Snýr seg eisini um okkara journalistiska handverk og alt tað, sum hongur uppi í hesum. Journalistar hava eins og øll onnur brúk fyri at menna seg og støðugt at gerast betri í sínum dagliga starvi. Hetta kann vera eitt sindur trupult í einum lítlum landi við einum so avmarkaðum starvsfólkahópi sum journalistarnir eru. Harfyri eiga vit ikki at gevast í forhond, men taka málið í størsta álvara. Vit, ið starvast í hesum yrkinum, eiga at taka til okkum tær atfinningar, ið eru frammi. Á fimti ára degnum hjá Kringvarpinum var bæði rís og rós. Lat okkum taka konstruktivu atfinningarnar til okkum, ikki bara tey, sum starvast í loftmiðlunum. Men lat okkum samtíðis seta myndugleikunum tað náttúrliga krav at skipa fyri eftirútbúgving í fyrstu atløgu og grundleggjandi fjølmiðlaútbúgving í øðrum umfari.

Tað er nú staðfest, at breið semja er um, at føroyskum journalistum tørvar førleikamenning yvir ein breiðan kamb, tað veri seg føroyskt mál, journalistikk sum heild og kunnleika til samfelagið og samfelagsins mekanismur. Tað er nú tikið stig til eitt felags átak mótvegis myndugleikunum. Hetta skuldi ikki verið nakað stórt ella trupult mál. Tað er bert at áleggja Fróðskaparsetrinum at fara undir eftirútbúgving av fjølmiðlafólkum. Vit hava longu, sum er, ein part av lærarunum á Føroyamálsdeildini og Søgu- og samfelagsdeildini. Teir lærarar, sum vit ikki hava, kunnu vit fáa uttaneftir. Nú er nóg mikið tosað – latið okkum nú fara til verka. Ein betri útbúgvin journalisthópur kemur at gagna øllum samfelagnum. Tað eigur tó ikki at verða steðgað við eftirútbúgvingini. Næsta stig eigur at vera ein føroysk journalist ella fjølmiðlaútbúgving á Fróðskaparsetrinum.

**Sosialurin**

## Atlantic Adventure í Hvalba

**HERGEIR NIELSEN**
www.hergeir.com



*"Umsóknin um at seta á stovn eftirskúla í Hvalba er til viðgerðar í Mentamálaráðnum, og verður politisk støða tikin til málið, tá ið viðgerðin er liðug."*

Soleiðis svaraði løgmaður mær einum skrivligum fyrispurningi tann 24. november 2006

Hesi tíðindi løgmans vóru fylgd upp í einum munnligum fyrispurningi til landsstýrismannin í mentamálum tann 7. februar 2007.

Landsstýrismaðurin varð spurdur, nær og hvussu nógvir fundir vóru hildnir um Atlantic Adventure Eftirskúlan í Hvalba, hvussu fjølmentir fundirnir høvdu verið, hvørjar niðurstøður gjørdar vóru, og hvussu framtíðarútlitini vóru fyri hesum eftirskúla.

Orsøkin til hesar nágreiniliga orðaðu spurningar var, at als einki virksemi sást hava verið um hetta mál.

Sum øllum kunnugt, so var ítøkilig ætlan um fyrsta eftirskúlan í Føroyum løgd fram á tíðindafundi 10. oktober 2006 umborð á Smyrli.

Eftirskúlin hevði fingið heitið Atlantic Adventure Eftirskúlin og skuldi byggjast í Hvalba. Skúlin skuldi rúma 80 næmingum.

Undir fíggjarlógarviðgerðini skutu vit undir aðru viðger upp at játta 7,5 mió. kr., og tá ið samgongan hevði felt tað uppskotið, skutu vit við triðjku viðger upp at játta 5 mió.kr. til at fara undir hendan harðliga tiltrongda skúla.

Hetta uppskotið varð eisini skotið niður av samgonguni.

Síðani bíðaðu vit í spenningi eftir, hvussu álvarsliga samgongan var farin til verka, og hvussu langt hon var komin í hesum máli, og tí varð í spenningi bíða eftir svari upp á frammanfyri nevnda spurning.

Landsstýrið hevði havt ein, sigur og skrivar EIN fund um málið tann 22. januar saman við stigtakarunum, segði landsstýrismaðurin, hvussu fjølmentur fundurin var, hvørjar niðurstøður gjørdar vóru, og hvussu framtíðarútlitini vóru fyri hesum eftirskúla, svaraði landsstýrismaðurin ikki uppá.

Tað var so álvarin í málinum um www.hergeir.com/index.php?id=711" Atlantic Adventure, Eftirskúlan í Hvalba sæð við landsstýrisins eygum.

Rætt skal vera rætt.

Vanligu orðingarnar, sum knýttar verða upp í øll mál, sum vit reisa á tingi, komu so eisini við hesuferð.

Málið er áhugavert, og landsstýrið arbeiðir við tí, segði tann sera viðeiriligi landsstýrismaðurin.

## Sambandsflokkurin í svárari kreppu, sigst

**FINNLEIF GUTTESEN**
Tvøroyri



Hvør er tað nú, ið kemur við hesum ófrættatíðindum. Jú, fyrst er tað ein veljarakanning umbiðin av Dimmu, síðani leiðarin í Dimmalætting, og so kemur ein spinndoktari úr Gøtu, ið ikki fekk sín vilja fyri einum ári síðani, tá ið hann var við til at fáa ein tingmann úr Suðuroy út á glatis.

At ÚF og SVF fylgja hesum upp, er sjálvsagt, tí annars høvdu tey eingi tíðindi, har koma bert ófrættatíðindi, sólskinssøgurnar er ein býur í Kina.

At 266B kann og skal brúkast av teimum "kristiligu", síggja vit best, tá ið skrivarin í Sambandsflokkinum, ið stillar upp í Eysturoy, fór út og segði, at hann vildi ikki vera atkvøðuneyt hjá tingformanninum, ið ikki var heilt so "kristin" sum hann, og vónar sjálvsagt at fáa sær nakrar bíligar atkvøður í Eysturoy til komandi valg.

Nú kemur panikkur í næstformannin í Sambandsflokkinum, tí kanska missir hann atkvøður til skrivaran, so har er bert eitt at gera, tað er at yvirtrumfa skrivaran fyri at vísa, hvussu "kristin" ein er, og tað allar týdningarmesta, ikki at missa atkvøður.

Næstformaðurin royndi so at gera tað, ið eingin hevur klárað enn, at blása og hava mjøl í munninum samstundis, men tað eydnaðist heldur ikki hjá honum

Ikki eiti á kreppa, ein Dimma, ið "gloymir" tað positiva, spinndoktari, ið ikki fekk sín vilja, skrivari og næstformaður, ið bert eru úti eftir atkvøðum við at misbrúka tí kristnu læruna.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.